Heysthálvan 2001

Stóra
Teldukoyrikortið
byrjar 20. august

Undirvíst verður
mánadag og mikudag
frá kl. 13.00 - 16.45

Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Tel: 318813, Fax: 313374
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, http: //sth.olivant.fo

Heysthálvan 2001

Teldukoyrikort
byrjar 21. august

Undirvíst verður
týsdag og hósdag
frá kl. 8.30 - 12.15

Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Tel: 318813, Fax: 313374
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo, http: //sth.olivant.fo

# Regatta 2001

## Um viðrar verður tann árliga regatta-siglingin fríggjadagin 10. august

Siglt verður av Eiði kl. 19.30, verða í Hósvík uml. kl. 22.30.

Allir bátar kunnu luttaka.

Prísur 100 kr. pr. persón. Heitur matur íroknaður og ábit leygarmorgunin.

**Dansur**
verður í Bygdarhúsinum frá kl. 23.30. Orkestrið Moonshot úr Vestmanna spælir. Kostnaður 80 kr.

Møguleiki er at seta tjald upp.

**Leygardagin kl. 14.00**
verður siglt út til Nólsoyar, har Ovastevna er. Møguleiki er at keypa okkurt til matna.

Møguleiki er at seta tjald upp.

**Tilmelding**
á tlf. 422589, 422578, 422368, 422148, 422096 ella e-mail: regatta2001@yahoo.dk
Til ber at gjalda á konto 9181.133.309.9 í Føroya Sparikassa. Viðmerkjast skal bátanavn og tal av persónum.

Seinasta freist at tekna seg er týsdagin 7. august kl. 20.00.

SØLUFÓLK TIL ELDING • SØLUFÓLK TIL ELDING

Sølufólk
til Elding í Tórshavn

Elding søkir eftir sølufólki til handilin í SMS at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert arbeiðspláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Vit vænta, at tú hevur útbúgving og royndir innan handil og sølu.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 17. august 2001 og skal sendast til:

Elding í SMS
Postboks 1289
110 Tórshavn

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

TK Stovan

Ókeypis ráðgeving

Endamálið við TK Stovuni er at skapa vøkstur og menning á føroyskum virkjum.

Vit kunna vegleiða tær í spurningum viðvíkjandi rakstri, menning og leiðslu. Røkkur okkara kunnleiki ikki, fáa vit samband í lag við aðrar ráðgevar, ið kunnu hjálpa tær.

31 73 66
www.tk.fo

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fot
E-mail tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

Ljóð-útgerð
til brúdleyp, føðingardagar o.a. til leigu.

Eisini fæst videokanón sera bíliga.

Intro
v/Dánjal Petersen
Gæsugøta 9
100 Tórshavn
Telefon 22 18 85

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Keyp myndir
Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum





Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:
10x15 cm. kr. 80,- 18x24 cm. kr. 150,-
13x18 cm. kr. 100,- 20x30 cm. kr. 200,-
15x21 cm. kr. 130,- 30x45 cm. kr. 350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.:
Síða:
Stødd:
Mongd:

Navn:
Bústaður:

Telefon:

CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.
D. B. Bilar
Tel. 310 600
Sosialurin - 311820

www.sosialurin.fo



Kapellmeistarin Kim:

# – Nógv feit løg stava frá Grand Prix

**Tá brøðurnir Olsen leygarkvøldið fara á pallin, verður talan um væl fyrireikað tiltak, ið byrjar rættstundis og endar á miðnátt. Ein føroyskur bólkur, við rómanum av føroyskum tónleikarum, er settur saman til at byrja tiltakið. Ein Grand Prix bólkur, ið neyvan finnur sítt Waterloo og sum ein í sínum stilla sinni bert kann siga um: Hallelujah**

GRAND PRIX TÓNLEIKUR
*Orð/myndir*
*Dagfinn Olsen*

Tað er týskvøld. Í Djónastovu í Havn eru nøkur fólk savnað. Tey hava tað felags, at tey teljast millum tey frægu innan føroyskt tónleikalív. Og eisini, at tey teljast millum teirra, ið Kim Hansen hevur savnað rundan um seg at manna Eurovision Hit Band.

Eurovision Hit Band skal hita upp, sum tað eitur, tá Brøðurnir Olsen fara á pall í Havn leygarkvøldið.

### Altíð fylgt við í Prix

Havnin andar tungliga, eftir júst farnu ólavsøkudagarnar. Rættulig ferð er ikki á ferðsluni eingang. Enn ber til at síggja ólavsøkugestir, ið halda fornum siði í hevd, og halda veitsludagar meira enn tann eina dagin ella tveir.

Hóast talan er um tónleikarar við ljóðføri í hond, so er eisini friðarligt at koma inn í Djónastovu hetta kvøld. Men brátt kemur lív í og fyrsta venjingin er byrjað.

Ein Bischen Frieden, Waterloo og Hallelujah ljóma. Tað gongur væl.

- Fyrireikararnir ringdu til mín við hugskotinum um at savna ein Grand Prix bólk. Hetta eru nakrar vikur síðani, sigur Kim Hansen, ið er kapellmeistari.

- Eg helt hetta ljóða spennandi. Eg havi altíð fylgt við í Grand Prix, sjálvt um tað hevur gingið upp og niður við hesum tiltakinum. Men tað er tó, sum hevur Grand Prix fingið eina endurreisn, heldur Kim.

- Vit spæla løg, ið fólk kenna. Tað er ikki altíð, at vit hugsa okkum um og seta góðu løgini í samband við Grand Prix, men sera nógv feit løg stava frá Grand Prix, sigur Kim.

Kim hevur síðani gingið og hugsað um, hvussu farast skuldi til verka, tí vanliga hava prixløg verið løgd tilrættis við stórum symfoniútsetingum. Fyrst var ætlanin bert at leika blásarar á ljómborðinum, men tað var, sum vantaði okkurt. Og so var tað eisini sjálvur parturin við showinum, ið hugsast skuldi um, og har prýða blásarar um.

Magnus og Kim hava skrivað útsetingar til blásararnar, so hetta er sum tað skal vera.

Men Kim hevur heitt á góð fólk. Kim hevur vanliga nakrar tónleikarar, ið hann leikar saman við og hesir telja grundstammuna í bólkinum.

Tað hoyrist, at Arnfríð Lutzen hevur fylgt við í tyskt tímunum, tí hon er tað, ið syngur nakrar av sangunum, uimframt Kim og eisini Pætur við Keldu, ið eisini verður við.

Manningin er Kim Hansen, Jóhannus á Rógvu Joensen, Kaj Johannesen, Magnus Johannesen, Ólavur Øster. Hesir manna grundbólkin. Arnfríð Lützen, kend úr m.a. Kulum Rótum, syngur. Blásarar eru eru Tróndur Enni, Mortan Zachariassen og Mass Hoydal. Í kórinum syngja Laila Carlsen og Margreta á Rógvu Joensen. Umframt fer Pætur við Keldu eisini at leika.

### Onnur víst áhuga

Vit hava sett okkum í eitt horn at práta, meðan ein lítil støðgur er.

- Vit skulu spæla í einar 45 minuttir. Vit venja nú og fríggjadagin verður rættuliga farið undir endaspurtin, sigur Kim, áðrenn boð aftur eru eftir kapellmeistaranum.

Kim sigur, at fleiri spælistøð hava víst áhuga og fegin vilja hava Eurovision Hit Bnad at spæla hjá teimum. Men enn er einki endaligt hesum viðvíkjandi, tí fyrst er tað leygakvøldið og Olsen Brøðurnir, ið eru á skránni.

Og sangskránni hjá Kim og teimum er einki í vegin við, tí í Djónastovu ljóma í hesum døgum løg sum Waterloo, Hallelujah, Ein Bischen Frieden, Save your kisses for me, Let me be the one, Love shine a light og Hold me now.

### Skil í

Tað er pop.fo og Kyndil, sum í felag fyrireika konsertina leygarkvølið.

Steintór Rasmussen sigur, at talan verður um eitt væl fyrireikað tiltak.

Byrjað verður rættstundis og endað verður á midnátt. Tróndur Djurhuus verður vertur og hann er vanur við at fáa tiltøk at ganga væl og at halda tíðarætlanir.

Eftir at hava órogvað við myndatøkum og við práti við kapellmeistaran, raggar blaðmaðurin sær út aftur.

- Kanska skuldu vit tikið Wings of Love, er tað onkur sum sigur og so ljómar láturin.

Jú, tey eru komin í gongd við fyrstu venjingina. Hava lisið hvønn annan av og eru um at gerast ein eind. Tann fyrsta av sínum slag í Føroyum.



*Myndaviðgerð: Jón Tórur Einarsson*